# 72 nýggjar íbúðir millum Horna í Havn

**Tórshavnar Býráð samtykti hóskvøldið at lýsa eitt øki millum Horna í Havn til sølu. Kommunan hevur fingið umsókn frá KJ Contractors, sum ætlar at byggja 72 íbúðir á økinum, treytað av at eitt jarðarstykki hjá býráðnum fæst til keyps**

ÍBÚÐARBYGGING

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Á hesum øki oman fyri gamla Landsvegin úti »á Krossinum« í Havn skulu seks sokallað punkthús byggjast við tilsamans 72 íbúðum*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

KJ Contractors hava saman við øðrum søkt um loyvi at byggja høg hús millum Horna í Havn. Talan er um økið oman fyri endan á gamla Landavegnum, ella tað, sum havnarfólk róptu »úti á krossinum«.

Fyrsta uppskotið frá 2002 varð havnað, tí ov stórt frávik var. Nú hevur felagið gjørt eina nýggja ætlan, sum umfatar bygging av sokallaðum punkthúsum. Talan er um hús við kjallara, trimum hæddum og innrættaðum lofti. Kjallararnir verða nýttir til goymslu o. a.

- Talan er um nýhugsan, og húsini fella sera væl inn í lendið, og tey hóska væl til føroyskan byggisið, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri. Leggjast kann afturt, at í húsunum verður lyft og ruskskakt.

Byggiætlanin er í A2 økinum, sum er til høga bústaðarbygging. Umsøkjarin hevur fingið tilsøgn frá tveimum jarðareigarum um sølu, men neyðugt er, at Tórshavnar Kommuna selur part av einum stykki, sum liggum millum tey bæði stykkini, umsøkjarin hevur fingið tilsøgn til.

Grundstykkið verður tað 15.000 fermetrar. Bygningarnir verða seks í tali við 12 íbúðum í hvørjum - tilsamans 72 íbúðir og kring húsini skulu verða í minsta lagi 108 parkeringsplass, soleiðis at hálvt annað parkeringspláss er til hvørja íbúð. Men Kristen Johansen frá KJ Contractors sigur, at gjørd verða 144 parkeringspláss, svarandi til tvey pláss fyri hvørja í búð.



*Tekningin sýnir framsíðuna á punkthúsinum. Seks slík hús skulu byggjast millum Horna í Havn*

# Kári vil skifta kommununavn

**– Tað hevði tænt øllum best, um nýggja stórkommunan, Runavíkar Kommuna, hevði eitt navn, sum allir borgarar í kommununi kenna seg sum partur av, sigur Kári P. Højgaard sum heldur, at kommunan eigur at skifta navn**

NAVNABROYTING

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Kári P. Højgaard heldur, at Runavíkar Kommuna eigur at hava eitt navn, sum allir borgararnir veruliga kenna seg sum part av felagsskapinum*

Verður tað, sum Kári P. Højgaard vil, so fer Runavíkar Kommuna at skifta navn. Umframt at vera løgtingsmaður, er Kári P. Højgaard eisini varaborgarstjóri í Runavíkar Kommunu.

- Eg eri onga løtu í iva um, at tað hevði tænt øllum best, um vit funnu fram til eitt annað felagsheiti fyri stórkommununa. Finna vit fram til eitt navn, sum allir borgararnir veruliga kenna seg sum ein partur av, hevði tað styrkt felagskapin og knýtt okkum betur saman í eina eind, sigur Kári P. Højgaard.

Tað var tann 1. januar í ár, at samanleggingini millum Skála-, Elduvíkar-, Runavíkar- og Oyndarfjarðar Kommunu varð veruleiki, men kommununavnið er framhaldandi navnið á størstu eindini í felagsskapinum.

- Tað kennist til dømis løgið í oyrunum á mær sum Heiðamanni at hoyra kunngerð um arbeiði á Skála, ið er undirritað av Runavíkar Kommunu. Kundi hugsað mær, at tað hinvegin kennist enn verri hjá borgarunum í teimum fyrrverandi smærru kommununum, sigur Kári P. Højgaard, sum tí heitir á Runavíkar Býráð, um at taka spurningin til viðgerðar og taka prinsipavgerð um navnabroyting.

- Er undirtøka fyri hesum, er ein møguleiki at skriva út navnakapping um at finna rætta heitið fyri felagskommuna, sigur Kári P. Højgaard, sum leggur afturat, at virðisløn kundi verið latin fyri bestu hugskotini.

## Alle gode gange tre...

KONSERT

Tá Danmarks Radio Big Band vónandi lendir í Vágunum týsdagin í sambandi við konsertina saman við Eivør Pálsdóttir, er hetta triðju ferð, at ætlanin hevur verið at fingið besta danska big bandið til Føroyar. Hinar báðar ferðirnar hevur veðrið gjørt, at tey 25 fólkini í ferðalagnum ikki eru sloppin at lenda í Vágunum.

G!Music, ið skipar fyri konsertini sigur, at tey vóna, at triðja ferð er hepna ferð. Konsertirnar verða í Læraraskúla-høllini hóskvøldið 13. oktober kl 20.00 og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði fríggjakvøldið 14. oktober kl 20.00

**nud**


BYGGIBÚÐ

damor



einans 10,-

**Vind og vatntætt**
Gjørd úr sterkum tilfari
Dubult sveisaðir kantar
Fleiri støddir

t.d 1,7 x 2,0 M



**Roykalarmur**
Við battarí, besløgum og skrúum
Góðkendur av DNV og heilsuráðnum í DK

65,-



**Søjlu borimaskina**
350 watt
1400 O/min
Stóran og stabilan fót
tekur borir frá 1,5 – 13 mm

798,-



**Parkettgólv**
Hvittoliera Gólv
3 stav
Fæst í eik ella ask
14mm tjúkt
Click system

$m^2$ 275,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor